gult6 cyan6 magenta6 svart6

Aftaná Verkfallið:

Nú er reint borð

– Nú líta vit frameftir, tí sáttmálin verður so tann sami, antin vit eru nøgd ella ónøgd, sigur Vilhelm M. Johannesen, formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag

ARBEIÐSFRIÐUR
Áki Bertholdsen

– Nú hava vit gjørt semju, so nú líta hava vit aftur reint borð.

Vilhelm M. Johannesen sigur, at hann hevur ongar viðmerkingar til, antin hann er nøgdur, ella ó-nøgdur.

– Úrslitið av sáttmálanum verður so tað sama, antin, vit eru nøgdir ella ikki. Nú eru samráðingarnar lidnar og kamelarnir eru svølgdir, so nú líta vit frameftir.

Hann sigur, at sjálvandi eru arbeiðsgevarar ikki fegnir um at skula lata aldursviðbót omaná eina so stóra lønarhækking, sum longu lá á borðinum frammanundan.

– Men vit máttu ásanna, at hetta skilaleysa og ábyrgdarleysa verkfallið var um at beina fyri alivinnuni í Føroyum, og tað kundu vit ikki standa modell til. Tí valdu vit at góðtaka semjuna og bjarga alivinnuni, sigur Vilhelm M. Johannesen.

Hann sigur, at viðbótin fyri starvsaldur svarar til ein lønarvøkstur uppá 900 krónur um árið.

Men arbeiðsgevararnir halda, at tað ringasta er, at framyvir fara íleggjarar og virkir at hugsa seg væl um, áðrenn teir seta virksemi á stovn í sáttmálaøki hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag, tí neyðuga støðufesti ikki er til staðar.

– Hinvegin kann roknast við, at Klaksvíkin og Havnin verða tikin fram um, tá ið virkisøki skal veljast, tí har eru samráðingarnar merktar av einum positivum anda og skilagóðum samskifti.

–Semjan kom væl við, men eg eri ógvuliga harmur um, at alivinnan varð tikin til gísla í verkfallinum, sigur Vilhelm M. Jonannesen, formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag. Myndina tók Jens Kr. vang undir samráðingunum á Hafnia mánamorgunin

Sera harmiligt

Vilhelm Johannesen sigur, at eitt, sum hann er sera harmur um, er, at alivinnan, varð tikin til gísla í verkfallinum.

– Eg eri harmur um, at tann sera álvarsliga ILA sjúkan bleiv brúkt sum eitt amboð í verkfallinum.

Tað, hann sipar til, er, at Føroya Arbeiðarafelag blokeraði fyri, at alibrúkið í Funningsfirði kundi viðgerast fyri ILA í verkfallinum.

– Eg veit ikki, hvat bretar høvdu sagt, um fakfeløg í Onglandi vóru farin í verkfall og høvdu blokerað fyri arbeiðnum at basa herviligu munn- og kleyvasóttini, so at hon slapp at breiða seg ótálmað um alt landið. Tað hevði neyvan gingið, men ILA-støðan í Føroyum kann samanberast við tað, sigur Vilhelm Johannesen.

Hann viðgongur, at hetta var ein orsøk til, at Føroya Arbeiðsgevarafelagið gjørdi, hvat tað kundi, fyri at finna eina semju.

– Júst støðan í Funningsfirði legði eitt stórt trýst á okkum, tí sleppur ILA at breiða seg, fer tað at fáa landsskaðiligar avleiðingar og tað kann gerast ein vanlukka fyri samfelagið.

Hann leggur tó dent á, at limirnir í Føroya Arbeiðsgevarafelag, sum vara av alivinnuni, hava ikki lagt trýst á nevndina fyri at fáa eina semju.

– Eg haldi, at partarnir vóru komnir hartil, at tíðin nú var búgvin til at fáa semju í lag . Og sum heild mugu vit siga, at semjan kom væl við.

Føroya Arbeiðsgevarafelag vónar nú, at politiski myndugleikin sum skjótast skipar viðurskiftini í hesum øki soleiðis, ongin aftur kann misbrúka eina sjúkrastøðu í alivinnuni í eini ósemju í arbeiðsmarknaðinum og sostatt hótta alt vinnugrundarlagið í framtíðini.

Tíðin farin frá primitivum verkføllum

– Eg fari ikki at siga, at verkfalsrætturin skal takast frá fólki, men verkfallini eiga at verða vend ímóti teimum røttu, sigur formaðurin í Føroya Arbeiðsgevarafelag

SEMJA
Áki Bertholdsen

– Nú má tíðin vera farin frá hesum primitivu verkføllunum.

Vilhelm Johannesen, at nú vit eru farin í eina nýggja øld, má tíðin eisini vera komin til, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum leggja á annan bógv.

– Eitt er at fara í verkfall. Men at róta í viðførinum hjá vanligum fólki og at forða fyri, at landsskaðilig fiskasjúka verður niðurbard, tað er at fara ov langt.

Hann heldur, at nú má tíðin vera komin til nýmótans samráðingartaktikk og -teknikk.

– Tað krevur álit millum partarnar og ein skilagott samskifti. Og tað krevur at allir partar vísa samfelagssinni og síggja støðuna í einum størri samfelagsligum samanhangi. Rakstrarróp og blokadur eru ikki vegurin fram tí í dagsins samfelag byggja arbeiðsfólk og arbeiðsgevarar sína vælferð á eina framleiðslu, sum báðir partar í felag varða av og ongin fær nakað við sær.

– Eg fari ikki at siga, at verkfalsrætturin skal takast frá fólki. Men verkfall mugu vera vend ímóti teimum røttu og ikki ímóti øðrum.

Sama løn fyri sama arbeiði

Arbeiðsgevarar hava hildið fast um, at vit skulu hava somu løn fyri sama arbeiði um alt landið. Fara tit nú eisini at taka limirnar í Havnar Arbeiðsmannafelag, og feløgunum í Klaksvík, fáa somu aldursviðbót, sum Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag, fáa?

Tað vil hann ikki svara beinleiðis uppá. Men hann sigur:

– Tað er framvegis ein meginregla, sum vit halda fast um. Og tað meginreglan fara vit at gera, hvat vit kunnu, fyri at halda. Hetta er eitt mál, sum verður tikið upp nú og tað kann ikki útihýsast, at aldursviðbótin verður sett í verk allastaðni, tí vit vilja hava, at lønin er tann sama, bæði í bygd og í bý.

Rótin til ruðulleikan

Vilhelm M. Johannesen heldur annnars, at hetta verkfallið var óneyðugt.

– Vit vóru komin so langt, áðrenn tað slitnaði, at tað var óneyðugt. Vit kundu havt rokkið einum úrsliti, uttan at hendanstøðan skuldi komaí. Og tað liggur fast, at í Klaksvík hava fólk í fiskaarbeiði forvunnið upp í 14.000 krónur hesar dagarnar meðan verfallið var.

– Tað er ikki ómøguligt, at limirnir í Havnar Arbeiðsmannafelag, og í feløgunum í Klaksvík, fara at fáa somu aldursviðbót, sum hini fáa, sigur Vilhelm M. Johannesen, formaður í Føroya Arbeiðsgevarafelag. Men hann lovar onki. Myndina tók Jens kr. Vang av samráðingunum á Hafnia mánanáttina

Men hann heldur, at helst eru óskipaðu viðurskiftini í Føroyum eisini ein rótin til ruðuleikan á arbeiðsmarknaðinum.

– Fyri arbeiðsgevarar hevði tað verið ein stórur fyrimunir um arbeiðarafeløgini høvdu klárað at semjast um eitt felags samráðingarupplegg næstu ferð. Tí so sleppur Føroyaland kanska undan einum nýggjum, skilaleysum verkfalli orsakað av innanhýsis millum arbeiðarafeløgini, siga arbeiðsgevararnir.

gult7 cyan7 magenta7 svart7

Løgmaður vigar framferðina

Framferðin hjá Tórbjørn Jacobsen verður í løtuni vigað av løgmanni. Anfinn Kallsberg umhugsar enn, hvørjar avleiðingar tað skal fáa at kalla landsgrannskoðaran gemenan bókhaldara frá tingsins røðarapalli. Men ósemjuna við vestmenningar vil hann ikki viðgera enn

SØMILIGHEIT
John Johannessen

– Tað er rætt, at Tórbjørn Jacobsen er ein litríkur maður, og at handligar hansara ofta eru óvgusligar. Men áðrenn eg kann blanda meg uppí, mugu vit gera okkum greitt, hvat niðurstøðan av slíkum skal vera.

Hetta sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður, sum í løtuni situr og umhugsar, um tað skal fáa avleiðingar fyri Tórbjørn Jacobsen, at hann frá tingsins røðarapalli hevur skírt Landsgrannskoðan at vera gemenan.

Tað var annars um reppið, at Tórbjørn Jacobsen misti landsstýrissessin, tá hann alment skírdi løgmann at vera ein danskan leigusvein, sum hevði fleiri lík í lastini.

– Uppsagnarbrævið var skrivað og lá klárt, sigur Anfinn Kallsberg, men vísir síðani á, at landsstýrismaðurin bað um umbering, og tí slapp at verða sitandi.

Løgmaður situr í løtuni og vigar, um tað skal fáa avleiðingar fyri Tórbjørn Jacobsen at kalla Landsgrannskoðaran gemenan bókhaldara frá tingsins røðarapalli. Men hann vil ikki gera ítøkiligar viðmerkingar til atburðin í øðrum viðurskiftum

Tórbjørn Jacobsen fekk tá at vita frá Tjóðveldisflokkinum, at træðkaði hann soleiðis við síðuna av einaferð afturat, misti hann landsstýrissessin.

Nøgv rok

Kortini hava verið onnur dømi, har landsstýrismaðurin hevur borið seg heldur ógvusliga at. Hann hevur skírt Landsgrannskoðaran at vera ein »gemenan bókhaldara«, skúlaleiðsluna í Vestmanna at vera ódugnaliga og hava politisk motiv, og feskasta dømið er, at hann hevur tveitt annan av varaskúlastjórunum í Vestmanna á dyr, tí hon kom at siga eitt danskt orð.

Løgmaður leggur afturat, at tað helst eisini kann arga fólk, at landsstýrismaðurin førir seg fram við beinunum uppi á borðinum, og at hann hevur eina stóra plakat av Che Guevara hangandi á vegginum.

– Men vit mugu gera okkum greitt, hvat niðurstøðan av slíkum atburði skal vera. Vit vita, at landsstýrismenn fyrr hava umboðað landið fullir, uttan at hetta hevur fingið avleiðingar. Tí mugu vit brúka tíð uppá at viðgera takseringina av revsigini av, áðrenn vit taka eina avgerð og skapa fordømi, sigur løgmaður.

Skal vera fólkaligur

Løgmaður vil ikki gera stórvegis viðmerkingar til pástandin um, at Tórbjørn Jacobsen skal hava tveitt annan av varaskúlastjórunum í Vestmanna út av fundi, tí hon segði eitt danskt orð.

– Eg vil hoyra hetta aðrastaðni frá, enn frá einum blaðmanni, áðrenn eg geri viðmerkingar til hetta málið, sigur løgmaður.

Anfinn Kallsberg ger tó greitt, at ein landsstýrismaður sjálvsagt skal vera fólkaligur, og at hann sjálvur hevur upplivað Tórbjørn.

– Men vit mugu eisini síggja málið út frá aktuellu støðuni. Hava fólkini úr Vestmanna sjálv lagt upp til balladu á fundinum, so er málið beinan vegin ørdvísi, enn tit leggja tað út, sigur løgmaður.

Tøgn í Tjóðveldisflokkinum

Tað ber framvegis ikki til at fáa viðmerkigar frá Tjóðveldisflokkinum til atburðin hjá Tórbjørn Jacobsen móti Vestmanna skúla

SØMILIGHEIT
John Johannessen

Tað hevur ikki borið til at fáa fatur á leiðsluni í Tjóðveldisflokkinum síðani tíðindini um, at Tórbjørn Jacobsen tveitti annan av varaskúlastjórunum í Vestmanna út av fundi í Mentamálastýrinum, tí hon kom at siga eitt danskt orð.

Sosialurin sendi Høgna Hoydal, formanni Tjóðveldisflokksins, avrit av greinini um atburðin hjá landsstýrismanninum, áðrenn hon fór í blaðið, og avtalaði, at hann skuldi gera viðmerkingar, tá hann hevði lisið hana.

Men grein fór gjøgnum teldupostin, hava boðini frá skrivara hansara verið, at Høgni Hoydal ikki má órógvast. Heldur ikki hevur borið til at fáa fatur á honum umvegis fartelefonina ella teldupostin.

Eisini hava vit roynt at fáa viðmerkingar frá Tórbjørn Jacobsen sjálvum, men heldur ikki hann hevur havt stundir at gera viðmerkingar til málið.

Vágbingar stuðla Vestmanna skúla

FÓLKASKÚLIN
John Johannessen

Lærararnir í Vágs skúla stuðla lærarunum í Vestmanna skúla í stríðnum um fleiri tímar.

Hetta boðar lærararáðsformaðurin í Vági, Sølvi Andreassen, frá í tíðindaskrivi í dag.

Lærararáðið í Vági kallar stríðið hjá vestmenningum eitt mótmæli móti hópisleysu framferð fólkaskúladeild Mentamálastýrisins viðvíkjandi tímabýtinum til skúlarnar.

– Tað ber ikki til at oysa uppgávur inn í skúlarnar, uttan játtanir fylgja við, ger lærararáðið í Vági greitt.

Norðmenn ynskja føroyskt fullveldi

Føroyingar mugu hava rætt at avgera sína egnu framtíð. Hetta halda nýggju norskir felagsskapir, sum fyrradagin handaðu Stórtinginum eina áheitan, um at stuðla føroyska fullveldisynskinum

FULLVELDI
John Johannessen

Danmark hevur dikterað møguleikarnar fyri sjálvstýri, og vil tí ikki geva føroyingum sjálvum nakað hóskandi val.

Hetta halda teir nýggju norsku felagsskapirnir, sum hava handað Einari Steensnæs, formanni í Stórtingsins uttanlandsnevnd, eina áheitan, um at stuðla føroyingum í sjálvstýrisstrembanini.

Norsku felagsskapirnir staðfesta, at føroyingar mugu fáa rætt til at avgera sína egnu framtíð. Og tískil heita felagsskapirnir á Stórtingið um at stuðla føroyska fólkinum.

– Nú hevur danska Fólkatingið samtykt, at samráðingar ikki skulu vera aftur við føroyingar, so leingi føroyingar vilja út úr ríkisfelagsskapinum. Hetta mugu norskir myndugleikar vísa frá sær, sigur Astrid Sverresotter Dypvik, leiðari av Norsk Målungdom, tá áheitanin varð handað.

Gera einki

Stórtingið fer kortini ikki at blanda seg uppí viðurskiftini millum Føroyar og Danmark.

Einar Steensnæs, formaður fyri Stórtingsins uttanlandsnevnd, gjørdi greitt, at tað sjálvsagt eru føroyingar sjálvir, ið skulu avgera sína egnu framtíð.

Men samstundis segði hann, at uttanlandsnevndin ikki ynskir at blanda seg í innanhýsis viðurskifti í Danmark. Hann lovaði at leggja áheitanina fyri nevndina og segði, at hann fylgdi málinum við áhuga.

Blaðstjórin Audun Skjervøy, sum er ein av stigtakarunum, var ikki nøgdur við viðmerkingarnar frá Einar Steensnæs.

– Eg haldi, at Stórtingið má vera greitt í síni talu. Tað er bæði ein moralsk og søgulig skylda at venda eyguni vestureftir, segði hann.

Stigtakararnir til áheitanina vóru mentanaráðsvísin Dag og Tid og felagsskapurin Norsk Målungdom. Harafturat stuðlaðu Noregs Ungdomslag, Senterpartiet, Rød Ungdom, Senterungdommen, Noregs Mållag, Norsk-Færøysk lag, tíðarritið Syn og Segn, Bul Oslo og Vestmannalaget áheitanini.